Music making a difference
Voices united against AIDS
ONE WORLD BEAT
Í Mentanarhúsinum í Fuglafirði
19. & 20. mars 2004

# One World Beat av bakkastokki í morgin

**Alheims tónleikafestivalurin One World Beat byrjar í annaðkvøld og føroyski parturin fer fram í Fuglafirði. Fríggjakvøldið er fyri tey yngru og leygarkvøldið fyri tilkomin. Í dag og í morgin greiða vit frá luttakandi bólkunum**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Sosialurin hevur hesa vikuna greitt frá tiltakinum One World Beat. Og nú er tíðin komin at greiða frá luttakandi bólkunum. Fríggjakvøldið er ætlað yngra ættarliðnum og leygarkvøldið er cafekvøld við dansi, sum er ætlað tilkomnum, og eru bólkarnir skipaðir eftir hesum leisti.

Vit fara at greiða frá leygarkvøldsbólkunum í blaðnum í morgin og leggja fyri í dag við bólkunum, sum fara á pall fríggjakvøldið.

Fríggjakvøldið fara All That Rain, Deja Vu, Sic, 48 Pages og Speaker á pallin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði og hava vit heitt á bólkarnar um at greiða eitt sindur frá um seg sjálvar og hví teir taka lut í One World Beat tiltakinum.



*Déjà vu vóru við til Prix Føroyar í 2001 og í 2003 har teir endaðu á 2. plássi. Onkur vil vera við, at Deja Vu í veruleikanum áttu at vinnið Prix Føroyar, men tað er manningin í Deja Vu ikki samd í…*

### Søgan um All That Rain

..er hendan: Desember 1999; All That Rain verður stovnað av Jens Tummas Næss, Henning Nicodemussen og Jens Marna Hansen. Allir tríggir vóru limir í bólkinum Kjølar áðrenn. Mars 2000; Fyrsta almenna framførslan hjá All That Rain, í Ítróttarhøllini á Hálsi, sum upphitingarbólkur hjá donsku TV2. November 2000; Manningin í All That Rain slær seg saman við manningini í Dynamitt, og spæla november og desember mánaða sum Dynamitt 2000.

Januar 2001: All That Rain vinnur innleiðandi umfar av Prix Føroyum 2001 í Ítróttarhøllini í Klaksvík.

Apríl 2001: All That Rain gerst nr. 2 í finaluni av Prix Føroym 2001, í Norðurlandahúsinum. Vinnari gjørdist Clickhaze úr Gøtu.

Juni 2001: All That Rain kemur út við síni fyrstu útgávu »The Naked Truth«. Sama dag kemur onnur útgáva út »Prix Føroyar 2001«, har All That Rain eisini er á, við lagnum Happy When You're gone, ið var tikið upp »live« til Prix Føroyar 2001 finaluna.

August 2001; Jens Marni Hansen fer úr All That Rain, og spælt verður fyri síðstu ferð saman við Jens Marna í Ítróttarhøllini í Klaksvík.

September 2001: Hans Ravnsfjall kemur við í All That Rain, sum avloysari fyri Jens Marna.

November 2001: Fyrsta almenna framførslan hjá All That Rain, á Platform, við Hans Ravnsfjall, sum sangara og gittarleikara.

Januar 2003: Pól Arni Holm kemur við All That Rain sum forsangari.

Mars 2003: Fyrsta almenna framførslan við Pól Arna Holm sum sangara, í Ítróttarhøllini á Kambsdali.

Manningin í All That Rain er: Pól Arni Holm - Sang, Jens Tummas Næss - Bass. Hans Ravnsfjall - Guitar, Henning Nicodemussen - Trummur. Heimasíðan: www.allthatrain.com

Og hví stuðlar bólkurin One World Beat tiltakinum?

– Vit halda hettar er eitt fantastiskt høvi, at vera við sum ein partur av so stórum tiltaki. Og eru sera glaðir fyri at gera okkara fyri at hjálpa.

Vit hava bert spælt tvey tiltøk í ár, í Platform og á Kambsdali til árliga Grýludansin. Hettar kemst av at vit hava sett tíð av til at gera tónleik.

Og vit ætla at nýta høvið til at framføra nýggj løg í Mentanarhúsinum fríggjakvøldið. Vit blivu upprunaliga spurdir um vit kundu taka okkum av »dansipartinum« í samband við tiltakið, men søgdu nei, fyri at fáa brúkt orkuna uppá nýggju løgini hjá okkum, vit skulu spæla uml. 5 løg. 2 av teimum verða spildurnýggj (ikki framførd áður) 2 av teimum eru spæld 2-3 ferðir áður, og eitt er gamalt, siga limirnir í All That Rain.

### Deja Vu

Vit hava biðið Deja Vu greiða frá um bólkin.

Vit hava spælt saman í meira enn 3 ár, og hava fleiri konsertir aftanfyri okkum.

Vóru við til Prix Føroyar í 2001 og í 2003 har vit, eftir at dømingin var av, endaðu á 2. plássi. Onkur vil vera við, at Deja Vu í veruleikanum átti at vinna Prix Føroyar, men tað er manningin í Deja Vu ikki samd í. Bòlkurin Gestir átti at vinna prixið, tí aftaná at dømingin var av, var Gestir frammanfyri við 5%. Hetta fer skjótt at vera 1 ár síðani.

Deja Vu hava eisini spælt nógv á caféum og barrum runt í Tórshavn, har vit leggja okkum eftir einari heldur øðrvísi blanding av coverløgum, og eitt sindur av egnum tilfarði.

Stílurin hjá Deja Vu kann lýsast sum syrupoppur, við tað at løgini og arrangementini eru popput, men sjálvdan uttanfráðvíkjandi elementum, sum kunnu lýsast sum syrut ella leitandi.

Ein útgáva er á veg við bólkinum, men ilt er at siga júst nær hendan verður útgivin. Ein partur av upptøkunum eru lidnar, men enn manglar nakað. Fløgan er altso ikki, sum áður nevnt í bløðunum, klár til mixing júst enn. Í fyrsta lagi í summar kunnu vit vænta okkum eitt Deja Vu.

Og hví stuðlar Deja Vu One World Beat?

Deja Vu játtaði at stuðla tiltakinum til frama fyri AIDS rakt børn, tí tiltakið er eitt frálíkt og jaligt hugskot, sum vónandi fer at verða við til at gera ein mun, ikki í okkara pengapungi, men í lívinum hjá teimum neyðars børnum, sum eru rakt av HIV. Tað minsta vit kunnu gera er at siga ja til slík tiltøk. Eisini er tað eitt gott høvi at presentera egið tilfar.

Møtið fjølment, stuðla einum barni.

Tíverri hava vitt ikki eitt heilt yvirlit yvir manningina, men kunnu, uttan at taka munnin ov fullan, nevna Líggjas, Rógva og Flóvin.

### Sic

Manningin í Sic er Mikkjal Gaard Hansen: Sang og guitar, Eddie Jacobsen: Guitar, Meinhard Joensen: Bass, Kári Skibenæs Nielsen: Trummur.

Mikkjal er millumannað kendur sum forsangari í bólkinum Krit, sum kunnugt er givin.

SIC hevur uml. eitt ár á baki, og hevur í seinastuni framført nakrar ferðir. Bólkurin spælir harðan rocktónleik.

Og hví tekur Sic lut í One World Beat titakinum?

– Grundin til at vit søgdu ja til hetta tiltak er sjálvandi tí, at tiltakið hevur eitt gott endamál, sigur manningin í Sic.

### 48 Pages

48 Pages er manning úr bólkinum Monkey Mongulia, sum nú spælir undir nýggjum navni. Teir ið manna hendan bólk eru: Eyðun Müller Thomsen trummur, Bartal Læarsson bass, Frans Jónas Arge Galán guitar og sang og Bjartur Dal Christiansen guitar. teir siga seg spæla »Friðarligan-Harðan-Sýrutan-Rock«.

### Speaker

Speaker eru fýra mans í tali og eita teir: Bogi Berg guitar, Sigurd Justinussen trummur, Jan Jensen bass, og Janus Rasmussen á sang og guitar. Og teir spæla »Sveimandi alternativan rock«. Tað hevur ikki eydnast at fáa viðmerkingar frá seinast nevndu bólkum áðrenn evstamark, men óivað eru teir eisini við, tí teir meta tiltakið hava gott endamál, eins og hinir luttakandi bólkar hava borið fram.

### Tey ungu eiga kvøldið

Hervið eru bólkar og manningar nevndar, sum fara á pall í Fuglafirði fríggjakvøldið, ið er kvøldið til yngru áhoyrararnar.

Í blaðnum í morgin fara vit at siga frá bólkunum, sum fara á pallin leygarkvøldið, sum er skipað sum café og dansikvøld, ið er áhoyraravinarligt, so tilkomni lurtaraskarin uttan himpr kann leita sær í Mentanarhúsið í Fuglafirði leygarkvøldið.

### Fakta

One World Beat er alheimsfestivalur, har øll arbeiðsorka er sjálvboðin og peningurin fer í ár til børn, ið hava Aids/HIV. Felagsskapurin Keep a Child Alive arbeiðir fyri hesum og fær peningin.

Føroyar eru partur av alheimsfestivalinum, sum fer av bakkastokki í 40 londum samstundis. Í Føroyum er Mentanarhúsið í Fuglafirði karmur um tiltakið 19. og 20. mars.
FUT er høvuðsfyrireikari. Til ber eisini at stuðla við at fara inn á heimasíðurnar hjá omanfyri nevndu felagsskapum.

Í Føroyum fara dugnaligir tónleikarar á pall í Fuglafirði um vikuskiftið; fríggjakvøldið er fyri yngra ættarliðið og leygarkvøldið meira fyri tey tilkomnu, har hugnin er í hásæti við tónleikacafé og góðum dansi.

**Keep A Child Alive**
Keep A Child Alive hevur til endamáls at útvega lívsneyðugan heilivág til tær 3,2 milliónirnar børn, ið liva við HIV/eyðkvæmi (AIDS) í triðja heiminum. Hvønn minutt doyr eitt barn, tí at tað ikki hevur atgongd til lívsleingjandi antiretrovirala (ARV) viðgerð, og Keep A Child Alive hjálpir við at útvega antiretroviralan heilivág til tey børn, ið liva við HIV/eyðkvæmi (AIDS). www.keepachildalive.org

**One World Beat**
One World Beat er eitt non-profit-tiltak við høvuðssæti í Sveits. Endamálið er at savna samfelagsáhugaðar tónleikarar og vælgerð til frama fyri sosiala broyting; Tónleikur ið ger Mun!
One World Beat er eitt samtak av sjálvbodnum, og festivalurin loyvir tónleikarum og sjálvbodnum framat einum palli at bera sín boðskap fram, meðan teir styrkja tilvitanina hjá øllum Heiminum. Á hendan hátt útvegar festivalurin alneyðugan pening til at stuðla neyðstøddum. One World Beat samstarvar á hvørjum ári í felag við nógvar vælgerðarstovnar um hetta málið. www.oneworldbeat.org



Andras Róin:

# Føroyar sum framkomið kunningarsamfelag

**FarIce kaðalin og útbreiðslan av breiðbandi letur dyrnar upp fyri nýggjari vinnu, arbeiðsplássum og inntøkumøguleikum. Tað snýr seg um at tora at taka avbjóðingina, sigur Andras Róin, stóri á Føroya Tele, ið saknar eitt hægri ambitiónsniveau frá almennari og politiskari síðu**

VINNA
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*



*- Innan kunningartøknina eru Føroyar avgjørt kappingarførar. Vit hava førleikan, eru fleksibul og við nýggja samskiftiskaðalinum eru fløskuhálsarnir burtur, sigur Andras Róin, stjóri á Føroya Tele, ið tó saknar politiska tiltrúgv til hesa vinnugrein*

Við FarIce kaðalinum, ið ofta er lýstur sum samskiftismotorvegurin til umheimin, hvarv fløskuhálsurin, ið hevur forðað Føroyum í at gerast eitt breiðbandssamfelag. Eitt samfelag, har skjótt og fast internetsamband er ein møguleiki hjá teimum flestu, og har internetið tískil kann gerast ein munadygt amboð í gerandisdegnum.

- FarIce er sjálv fortreytin fyri hesum, undirstrikar Andras Róin, nú Føroya Tele av álvara hevur sett ferð á kunningarsamfelagið.

Í september í fjør stongdi Føroya Tele fyri heita vatninum, tá 300 privatir ADSL-kundar fyltu samskiftisvegin við útheimin. Men síðan skrúvað var frá aftur fríggjadagin í farnu viku eru yvir 200 breiðbandsføroyingar komnir afturat.

Og so skjótt skift varð frá gamla Cantat kaðalinum til nýggja FarIce kaðalin øktist ferðslan við 50 prosentum.

- Hetta vísir, at tað hevur verið ein tørvur til staðar, ið vit ikki hava verið førfyri at nøkta, staðfestir Andras Róin.

### Meiri ferð

Og stjórin á Føroya Tele er sannførdur um, at tørvurin fer støðugt at økjast enn meira. Tí møguleikarnir eru nógvir við nýggju samskiftisleiðini.

Tí hevur ein av fremstu raðfestingum hjá almennu telefyritøkuni seinnu árini verið at útbyggja kervið innanlands í Føroyum, so vit ikki fingu nýggjar fløskuhálsar her. Árligu íløgurnar til at fyrireika Føroyar til breiðbandssamfelagið hava seinastu árini verið 20 milliónir krónur, og síggjast aftur í fibrum, t.e. kaðalar til skjótt internet, til fleiri av størru plássunum. Men framvegis mangla Sandoyggin og Suðuroyggin, so eisini komandi árini fara at krevja stórar íløgur.

Afturat kemur so kostnaðurin av sjálvum FarIce kaðalinum, harav Føroya Tele ber fimtingin, ið er 80 milliónir krónur. Føroya Tele hevur sett 20 milliónir í partapeningi í felagið, meðan restin er veðhald.

- Føroya Tele er í dag væl fyri, og tí kunnu vit gera hesar íløgur, sigur Andras Róin og reisir samtíðis spurningin, hvørt fyritøkan hevur ráð til at lata vera.

Fyri 10 árum síðani var skuldin hjá Føroya Tele tríggjar ferðir nettosøluna, meðan hon í dag er hálva ferð nettosøluna. Í 2002 var yvirskotið góðar 53 milliónir, og roknskapurin fyri í fjør, sum verður lagdur fram í næstu viku, vísir eisini góð tøl, hóast yvirskotið er tódnað nakað.

### Breiðbands boom

Andras Róin vísir á, at seinastu trý árini er internet-økið sum heild stagnerað, sølan er ikki økt, og inntøkurnar hava ikki verið fleiri.

Orsøkin skal finnast í manglandi breiðbandinum, sigur stjórin á Føroya Tele, og vísir á ein mettaðan marknað fyri gamla, uppringda sambandinum.

- Tað er eingin loyna, at vit vænta okkum sera nógv av hesum virkisøki í framtíðini, staðfestir Andras Róin.

Nýggju møguleikarnir við skjótum og stabilum breiðbandi opnar eitt nú dyrnar fyri at fólk kunnu arbeiða heimanifrá. Og ikki minst kunnu fólk sita í Føroyum og arbeiða fyri fyritøkur uttanlands, eins og fólk kann sita uttanlands og gera uppgávur fyri føroyskar fyritøkur.

Og tað er millum annað her, stjórin á Føroya Tele sær stóra perspektivið.

- Nú hava vit eitt skjótt, trygt og at kalla óavmarkað internetsamband, umframt at vit hava gamla Cantat-kaðalin sum backup. Hetta gevur stabilitet, ið er fortreytin fyri at vit kunnu bjóða okkum fram at loysa uppgávur umvegis internetið, sigur Andras Róin.

Eisini sær hann stóran møguleikar fyri einum heilt nýggjum virkisøki, tað sonevnda "hosting". Í stuttum merkir hetta, at stór feløg kunnu leggja sínar servarar, ambætarar, í Føroyum. Tað veri seg bankar, veddingarfyritøkur osv. Inntøkurnar av hesum kunnu vera leigan av "hotell-plássi", tænastugjøld, rakstur og viðlíkahald. Onnur inntøkukelda eru stóru heimasíðurnar, portalarnir, ið jú liggja onkunstaðni, og sum skulu haldast við líka.

- Her er avgjørt eitt stórt potentiale, sigur Andras Róin og leggur afturat, at Føroya Tele longu hevur merkt áhugan uttanifrá.

Í nýggja høvuðssætinum hjá fyritøkuni í Hoyvík er hædd tikin fyri hesum inntøkumøguleika.

### Mangla ambitiónir

Stjórin á Føroya Tele vísir á fleiri styrkir, ið gera føroyingar væl fyri í kappingini við útlendingar, og sum eisini kann vera við til at draga fyritøkur til okkara.

- Føroyar eru eitt lítið samfelag, har stutt er millum ymsu liðini, og her eru nógv vælútbúgvið fólk.

Men avgjørt eru eisini veikleikar, ið seta okkum aftur í kappingini, metir Andras Róin. Hann nevnir fíggjarligu møguleikarnar, ið eru avmarkaðir, og eisini manglandi virðisbrævamarknaðurin, ið ger tað trupult at reisa kapital í Føroyum.

- Eisini er nakað, sum tíðir uppá, at vit mangla politiska tiltrúgv. Hóast hetta økið kemur á prent í samgonguskjølum, so hendir lítið meira, vísir Andras Róin á.

Stjórin á Føroya Tele saknar stutt og greitt eitt hægri ambitiónsniveau.

- Innan kunningartøknina eru Føroyar avgjørt kappingarførar. Vit hava førleikan, eru fleksibul og við nýggja samskiftiskaðalinum eru fløskuhálsarnir burtur.

- Men karmarnir fyri hetta virkisøki mugu vera í lagi, sigur Andras Róin

Hann nevnir onnur lond, eitt nú Danmark, ið nýta milliardir av krónum til at granska og menna kunningartøknina. Men í Føroyum knípir sum nevnt við ambitiónsniveaunum.

### Konvergens

Ofta verður nevnt, at sum frá líður fara teldan, sjónvarpið, telefonin og annað við at smelta saman til eitt felags, integrerað amboð í gerandisdegnum. Tey konvergera.

Andras Róin sær fyri sær breiðbandsflatskermin við touch-pad á køksborðinum, har familjan kann lesa bløðini, hoyra útvarp og síggja sjónvarp, senda og móttaka teldupostar og –myndir, og annars gera síni ørindi.

- Tað er greitt, at nýggju møguleikarnir fara at skapa ein tørv, sigur Andras Róin avgjørdur.

### Mugu menna

Tíðum eru atfinningarsamar røddir, ið føra fram, at uppgávan hjá Føroya Tele er at geva føroyingum so bíligt telefonsamband sum gjørligt, og at fyritøkan skal halda seg langt frá øðrum virkisøkjum.

Ikki óvæntað er stjórin á Føroya Tele grundleggjandi ósamdur í hesum sjónarmiði.

- Eg vil heldur siga tað soleiðis, at skulu vit varðveita lága kostnaðin, so mugu vit fáa aðrar inntøkur, ið kunnu kompensera fyri traditionellu inntøkurnar, ið sum frálíður fara at hvørva, sigur Andras Róin og sipar til støðugt bíligari telefongjaldið.

Komið verður inn á Televarpið, ið liggur uttan fyri traditionella virkisøkið hjá Føroya Tele, men sum fyritøkan hevur valt at seta nógvar pengar í.

- Televarpið er ein spennandi ætlan, ið vit avgjørt rokna sum eina inntøkukeldu, bæði í Føroyum, men ikki minst uttanlands.

Við tí seinasta sipar Andras Róin til, at Føroya Tele hevur undirskrivað fyrsta sáttmálan um at selja Televarpið sum konsept. Ein sáttmáli, ið hevur virði av umleið einari millión krónum.

- Her hava vit eina vitan, eitt konsept, ið kann seljast nógvar ferðir. Sama ger seg galdandi fyri alla kunningartøkni. Tú kanst selja vitanina nógvar ferðir. Tað er grundleggjandi munurin á hesi vinnu, samanborið við traditionella vinnur, sigur Andras Róin.